LM-099/2020

Fylgiskjal 11.

Eiði, tann 14. Januar 2021

Til: fisk@fisk.fo

Hoyringsvar til **Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving**

Serliga er tað trý punktir, sum Felagið Sløkkiliðsleiðarar hevur viðmerkingar til.

1. § 12 a. At skipa kommunal tilbúgvingarøkir
2. § 14 a. Fráboðanarsentralur fyri kommunalu tilbúgvingina
3. § 20 a. Samskiftisútgerð til tvørfakliga samskifti hjá pørtum í tilbúgvingini.

Punkt 1 - § 12 a. At skipa kommunal tilbúgvingarøkir

Felagið er av tí áskoðan, at tær kommunalu tilbúgvingarnar er bulurin í føroyskari tilbúgving, og hava í fleiri átøkum, so sanniliga víst hetta í verki.
Ikki soleiðis at skilja, at tilbúgvingarnar ikki kunna gerast betri, men í sær sjálvum geva størri eindir ikki eina betri tilbúgving, tað gerst best við at førleikamenna tilbúgvingarnar. Vit halda at landsmyndugleikarnir skulu leggja størri dent á, at skapa møguleikar fyri førleikamenning, heldur enn at tvinga samanleggingar.
Ivaleyst er tað so, at í einstøkum førum hevði tað verið gagnligt við tættari samstarvið millum kommunalar tilbúgvingar.

Tað er ein saknur at landið ikki, eins og gjørt verður í grannalondunum, fíggjarliga tekur lut í kostnaðinum, fyri kommunalu tilbúgvingarnar. Eitt nú við útbúgvingarmøguleikum.
Um landsmyndugleikarnir høvdu fyriskipað leiðsluútbúgving, tað verður seg átaksleiðara útbúgving bæði einstaka og tvørfakliga, hevði tað gagna føroyskari tilbúgvin almikið.

Hóast lógarheimild er fyri leiðsluútbúgving, sum helst skal dagførast (*Kunngerð nr. 150 frá 17. Desember 2001 um útbúgving av sløkkiliðsfólki*), hava landsmyndugleikarnir ikki víst stóran, fyri ikki at siga ongan, áhuga fyri at førleikamenna kommunalu tilbúgvingarnar á leiðslustigi.

Tað er eingin ivi um, við at skipa størri kommunal tilbúgvingarøkir, verður tað nógv dýrari hjá fleiri kommunum. Ein kommuna ið ikki hevur vinnu, kann tvingast at gjalda ein týðandi part hjá einari kommunu, sum tey verða løgd saman við, um hendan hevur stórar vinnubygningar og krav um nógv størri tilbúgving.

> *Vit mæla heldur til sjálvbodnar samstarvsavtalur enn tvang.*
>
> *Eisini mæla vit til, at landsstýrismaðurin á avvarandi øki, tekur upp arbeiðið við at skipað eina leiðsluútbúgving fyri átaksleiðslu í breiðum týdningi.*

Punkt 2 - § 14 a. Fráboðanarsentralur fyri kommunalu tilbúgvingina

Tað, at eitt land við góðum 50 túsund íbúgvum, skal hava 5 fráboðanarsentralar, man fyri mong síggja undarligt út. Felagið er av tí áskoðan, at tað als ikki eigur at koma upp á tal, at ein av kommunalu tilbúgvingunum skal hava ein slíkan fráboðanarsentral.
Øll sum hava við kommunala tilbúgving at gera, vita hvussu støðan er tá ið landið er herja av

stormum. Hetta vil vera eitt stórt kaos, og kann koma at hava eitt óendaligt kjak og stríð við tað tilbúgving, sum umsitur ein slíkan fráboðanarsentral.

Kostnaðarmetingin á kr. 3,5 mill er eftir okkara meting, langt frá hvat ein fráboðansentralur hjá kommunalu tilbúgvingunum kemur at kosta, at reka.

> *Tað eigur sjálvandi, at vera gjørd ein greina lýsing av hvussu komið er til ein árligan kostnað uppá kr. 3,5 mill fyri fráboðansentralin.*
>
> *Felagið mælir til at kannað verður um tað ber til, at savna allar ALARMSENTRALAR í Føroyum á einum stað, sum møguliga kundi húsast hjá MRCC. Hetta hevði avgjørt gagna føroyskari tilbúgving.*

Punkt 3 - § 20 a. Samskiftisútgerð til tvørfakliga samskifti hjá pørtum í tilbúgvingini

Tá ið skrivað verður, at landsstýrismaðurin kann áleggja tilbúgvingunum, at hava samskiftisútgerð til tvørfakliga samskiftið, liggur helst ein undirtóni í, at talan er um samskiftisútgerð, sum eitt nú løgreglan hevur ogna sær.

Er tað so, at landsmyndugleikarnir halda, at hendan samskiftisútgerð skal vera tann tvørfakliga, átti tað at verið landið, sum ber kostnaðin av rakstri av nevndu útgerð.
Um nú ein tilbúgving (sløkkilið) á 15 tilbúgvingarfólk, skuldi skift til tvørfakliga samskiftismøguleikan KIMA, so vil árligi kostnaðurin av hesum vera kr. 81.000,- . Tá er ikki keypið av hesum samskiftis radio ikki íroknaður.

> *Hetta vil fyri kommunalu tilbúgvingina vera rættuliga kostnavarmikið, og at áleggja hesa útreiðslu er heilt órímiligt.*

Sambært løgtingslóg um tilbúgving §4 skal "*Landsstýrismenn leggja týðandi tilbúgvingarmál og øll uppskot til lógir og kunngerðir viðvíkjandi tilbúgving fyri Tilbúgvingarráðið til ummælis*".
Hetta er okkum vitandi, pr. d.d. ikki gjørt, og heita vit á landstýrismannin, at tað verður gjørt.

Vinarliga

Asbjørn Østerø

Virkandi formaður

Felagið Sløkkiliðsleiðarar

Áheitan á tingfólk. Vit heita staðiliga á Løgtingsfólk, at tey, áðrenn tikið verður undir við nevndu uppskotið, seta seg væl inn í hvørjar fíggjarligar avleiðingar broytingarnar koma at hava fyri kommunalu tilbúgvingarnar. Tí eingin ivi er um, at hetta verður ein kostnaðarmikil broyting fyri flestu av kommununum, sum í minni mun kemur at røkka endamálinum, sum ætlað er.
Áheitan á Landsmyndugleikarnar Vit heita á avvarandi landsmyndugleikar um, at seta neyðuga peningaliga og arbeiðsorku av til, at styrkja tað fyribyrgjandi arbeiðið, sum eigur at verða gjørt á brunaøkingum. Sum er, er tað landsmyndugleikar, sum kunnu brunasýna allar bygningar har fólk koma. Hetta øki hevur aldrin fingið tað raðfesting tað hevur uppiborið, eins og í okkara grannalondum.